# ÚTBJÓÐING AT LISTPRÝÐA NÝGGJU FIMLEIKAHØLLINA FIMI Í GUNDADALI

**Listabólkurin hjá Tórshavnar kommunu bjóðar við hesum listafólkum at lata uppskot til uttandura listaverk til nýggju fimleikahøllina FIMI í Gundadali í Havn.**

Í hesum sambandi skal Listabólkurin gera vart við, at talan verður um listaverk, sum stendur úti, har fólk ferðast framvið. Dentur verður lagdur á, at listaverkið verður gjørt úr tilfari, sum hóskar seg til føroyska veðurlagið.

### ÚTBJÓÐING

Leisturin fyri útbjóðingina verður soleiðis:

- Listaverkið er eitt uttandura listaverk (standmynd) og skal standa á ávísum plássi. Sí tekning á www.torshavn.fo
- Listafólk lata uppskot (modell) inn við frágreiðing um listaverkið. Í uppskotinum skal greiðast frá hesum:
  1. støddin á listaverkinum
  2. kostnaður íroknað uppseting
  3. avhendingardagur
  4. neyvt greina tilfarið, sum verður nýtt til listaverkið
  5. geva trygd fyri, at tilfarið, ið nýtt verður til listaverkið, er haldgott og tolir føroyska veðurlagið
  6. at listaverkið og festini eru so haldgóð, at tað klárar í minsta lagi eina vindferð sum er 60 sek/m.
- Listabólkurin skilar sær rætt til frítt at velja millum uppskotini ella einki at taka.
- Tá Listabólkurin hevur avgjørt, hvør fær uppgávuna, verður sáttmáli gjørdur við viðkomandi listafólk, har m.a. treytir fyri avhending, uppseting, kostnað og aðrar treytir verða ásettar.
- Tá ið avgjørt er, hvør fær uppgávuna, skilar Listabólkurin sær rætt til at vísa fram alment innkomnu uppskotini í 14 dagar.
- Uppskotini skulu vera Listabólkinum í hendi í seinasta lagi mánadagin 25. mai 2010. Um uppskot koma inn eftir ásettu freist, verður sæð burtur frá teimum.

### MEIRI FÆST AT VITA

um útbjóðingina við at venda sær til Jákup Simonsen, mentamálaleiðara, telefon 302010.

www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Á Høgabóli · 600 Saltangará · Tel 44 76 04    N. Finsensg. 18 · 100 Tórshavn · Tel 36 30 00



Nýtt og lekkurt frá eva solo

Thomas Dam búnýti

## Stuðul úr Jólamerkjagrunninum



Sambært viðtøkunum hevur grunnurin til endamáls at býta út ágóðan av søluni av jólamerkjum, ið Posta gevur út á hvørjum ári. Ágóðin verður býttur út til frama fyri børn og ung til stovnar og feløg.

Grunnurin stuðlar størri samfelagsgagnligum verkætlanum fyri børn og ung.

Eitt trímannastýri hevur um hendi leiðslu grunsins og ger av, hvussu ágóðin verður býttur.

Stýrið er ikki bundið av, at umsókn er send, men umsóknir um stuðul úr Jólamerkjagrunninum í ár kunnu sendast grunninum í seinasta lagi 10. mai 2010 og skulu stílast:

**Jólamerkjagrunnurin**
**Postsmoga 3009**
**110 Tórshavn**

Posta